# ítróttur

Nr. 84 • leygardagur • 4. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# GÍ hevur møguleika at siga takk fyri síðst

**Men gøtumenn eru ikki væl fyri við fólki, tá teir í morgin fara á Svangaskarð, har teir ofta hava vunnið øll stigini**



B68-GÍ

*Jóannes Hansen*

Mikukvøldið var B68 venjarin, Frank Skytte, ein av fleiri venjarum, sum vóru í Gundadali og hugdu at fjórðingsfinaluni í steypakappingini millum B36 og HB. Frank Skytte hevði ivaleyst verið har undir øllum umstøðum, men hann hevði serliga orsøk at hyggja eftir HB. Sambært skránni skuldu hann og B68 fáa vitjan av HB í fyrsta umfarinum:

– Tá eg kom til hús aftur, frætti eg, at vit í staðin skuldu spæla ímóti GÍ. Tað er einki at gera við tað. Vit eru klárir at taka ímóti GÍ. Vit vunnu fjórðingsfinaluna ímóti teimum fyri einari viku síðani, men vit eru greiðir yvir, at talan verður um nýggja avbjóðing. Og eg ivist ikki í, at Johan Nielsen, sum er ein sera snúðin venjari, hevur hugsað nýggjar ætlanir um, hvussu teir skulu fella okkum, heldur B68 venjarin, sum sjálvur hevur nógvar royndir og tískil ivaleyst eisini hevur gjørt sær hugsanir um, hvussu hansara menn kunnu lumpa GÍ.

B68 venjarin ynskir ikki at tosa so nógv um spælararnar, sum ikki eru tøkir:

– Vit mugu spæla við teimum, sum eru tøkir, og eg havi álit á teimum.

Men nøvnini á skaðalistanum boða frá, at B68 er ikki heilt væl fyri. Marcello er langtíðar skaddur. Jan Petersen hevur verið langtíðarskaddur, hann er farin aftur at venja, men hann er ikki tøkur enn. Anders Nygaard og Fróði Benjaminsen eru ivasamir. Báðir dragast við vøddaskaðar.

### Henning og Krzystof burtur

GÍ hevur ikki so stóran 1. deildarhóp. Teir eru væl mannaðir, tá allir eru tøkir, men skaðar og aðrar orsøkir til, at spælarar ikki kunnu vera við, raka sera meint.

Popczynski var í álopinum í steypadystinum síðsta sunnudag, tá GÍ tapti 2–1 ímóti B68, men hann var illa fyri, og vit skilja, at hann verður ikki við í morgin. Tíðliga í vár varð hann skaddur í knænum, og síðani hevur hann eisini havt trupulleikar í rygginum. Henning Jarnskor býr framvegis í Danmark. Hann var heima og spældi fjórðingsfinaluna, men sambært GÍ venjaranum, Johan Nielsen, skuldi hann ikki koma heim í hesum vikuskiftinum.

Áslakur R. Petersen noyddist at fara av vøllinum, tá eitt korter var farið sunnudagin, men hann er tøkur aftur. Í Gøtu rokna teir við, at Súni Olsen kemur heim úr Hollandi í komandi viku. Hann verður góður styrkur at fáa, men hann verður ikki við ímóti B68.

Johan Nielsen hevur ikki so nógvar viðmerkingar til, at teir skulu spæla á útivølli ímóti B68, heldur enn at spæla á heimavølli ímóti VB.

– Eitt sindur keðiligt er tað, at vit nú skulu spæla á útivølli tveir teir fyrstu landskappingardystirnar, staðfestir hann. Í øðrum umfari skal GÍ spæla í Runavík.

GÍ plagar at hava takið á Svangaskarði. B68 venjarin, Frank Skytte, vil hava sínar menn at vera eyðmjúkar yvirfyri uppgávuni:

– Vit hava vunnið tríggjar steypadystir á rað, men vit eru ikki heimsmeistarar, og tað vita spælararnir væl, sigur Frank Skytte, sum gleðir seg til fyrsta landskappingardystin.

# Brýtur í bæði borð hjá báðum pørtum

**KÍ og B36, sum hittast í Klaksvík í morgin, hava ikki víst serliga sannførandi avrik síðstu vikurnar**

KÍ–B36

*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar hava bíðað eftir aftur at fáa vitjan av Skála. Uppflytararnir hava longu gjørt av við KÍ tvær ferðir í steypakappingini, men KÍ fær ikki, sum tað var lagt upp til í leikskránni, høvið at siga takk fyri seinast. Í staðin fer B36 til Klaksvíkar í morgin. Broytingin hevur við sær, at klaksvíkingar ikki hava dagførda leikskrá hesa ferð:

– Leikskráin er broytt til KÍ tíðindi, so hon hevur ikki bara við dystin at gera, men sjálvandi er tilfar um heimadystin ímóti Skála í blaðnum, sum er liðugt prentað. Arbeiðið varð gjørt, áðrenn vit frættu, at FSF hevði broytt leikskránna, sigur Svend Jacobsen, formaður í KÍ.

Í fjør spældu B36 og KÍ tveir tættar dystir. Annar var steypafinalan á ólavsøku, sum B36 vann 1–0, og hin var landskappingardysturin í Klaksvík. KÍ var leikliga omaná, men B36 vann 2–1, tí teir fingu tvey mál síðstu lítlu løtuna.

Tað hevur ikki roynst so væl hjá finaluliðunum í steypakappingini í fjør. Bæði liðini eru send úr steypakappingini, og serliga hjá KÍ hevur tað hilnast heilt illa. Einasti spælarin, sum nú er skaddur, er verjumaðurin Jan Andreasen, sum stríðist við skaða í fótliðnum.

Sunnudagin spældi KÍ venjingardyst á heimavølli ímóti LÍF. Tað gekk av skriðuni hjá KÍ, tí LÍF vann 2–1, og tað var uppiborið, frætta vit úr Klaksvík.

Fleiri av KÍ spælarunum hava verið plágaðir av skaðum í vár, og kavin hevur argað meiri har norðuri, enn hann hevur gjørt aðra staðni, men nú áttu spælararnir at havt vant og spælt seg í venjing. So fæst at síggja, um nakað verður í pjøkanum, tá KÍ hósdagin í komandi viku fer í Gundadal at spæla ímóti HB.

### Kenna seg eitt sindur illa

Hjá B36 er lagið einki serligt – hvørki so ella so. Teir halda ikki, at tað var heilt rímuligt, at teir skuldu spæla fjórðingsfinalu í steypakappingini mikukvøldið, tá hitt liðið, sum skal í hálvfinaluna, ikki verður funnið, fyrrenn verkfallið verður av. Og teir harmast eisini um, at teir skuldu kenna seg kroystar at fara til Suðuroyar at spæla ímóti VB í bólkaumfarinum, tá tað nú ikki ber til at ferðast hjá hinum.

Hin síðan av søkini er, at B36 hevur mist allan miðvøllin, sum var við til at bera liðið til FM heitið og steypasigurin í fjør. Og so hava teir mist Heðin á Lakjuni – til KÍ.

Miðvallarspælararnir, sum eru burtur, eru Jan Guttesen, sum er í Danmark, og Pól Thorsteinsson, sum er í NSÍ. Triði maðurin er Klæmint Matras. Hann hevur verið skaddur í fótliðnum í fleiri vikur, og tað gongst illa hjá honum at koma fyri seg aftur. Dino er plágaður av vøddaskaða, og Julian Floresco hevur verið skaddur í fleiri vikur.

# Talan kann gerast um lagnudyst

**Nýggju venjararnir á Eiði og á Skála eru greiðir yvir, at stigini frá innanhýsis uppgerðini á Mølini í morgin kunnu fara at vísa seg at hava avgerandi týdnging, tá tað verður gjørt upp í heyst**

EB/STREYMUR-SKÁLA

*Jóannes Hansen*

Skála stóð seg væl í bólkaumfarinum í steypakappingini. EB/Streymur er framvegis partur í steypakappingini. Teir eiga fjórðingsfinalu á ímóti VB.

– Vit vistu frammanundan, at vit skuldu spæla ímóti øðrum havnarliðnum í hálvfinaluni. Nú vita vit, at tað verður ímóti HB, skemtar EB/Streyma venjarin, Trygvi Mortensen.

Hann er sera spentur upp á fyrsta dystin, og eins og Skála venjarin, Mathias Davidsen, so er hann greiður yvir, at ein sigur í hesum dystinum kann vera sera týdningarmikil.

– EB/Streymur vísti í fjør, at teir kunnu fáa stig frá øllum, og vit hava í steypakappingini í ár víst, at vit kunnu fáa stig frá teimum, sum av góðum grundum verða roknað at teljast millum teir stóru. Men kortini eru vit vitandi um, hvar tað verður roknað við, at tað verður okkara lutur at stríðast. Tí kann úrslitið av dystinum í morgin hava sera stóran týdning, heldur Mathias Davidsen. Felags fyri hann og EB/Streyma venjaran, Trygva Mortensen, er, at teir tey seinnu árini hava havt sína dagligu gongd í NSÍ.

### Tvey reyð kort

Hjá Skála stendur tað ikki heilt so væl til við fólki, sum teir høvdu vónað. Í síðsta dystinum í bólkaspælinum í steypakappingini fingu tveir spælarar reytt kort. Tað var í Gundadali ímóti HB, at bæði Ronnie Hansen og Alexander Johansen vórðu riknir av vøllinum. Tí eru teir leikbannaðir í morgin.

Marius Joensen hevur verið plágaður av skaða í økslini síðani steypadystin ímóti KÍ, men hann er komin fyri seg aftur. Og so verður tað spennandi at síggja, hvussu Jonhard Frederiksberg fer at roynast í landskappingini. Hann hevur siglt nógv, og tí eru góðu fótbóltsevnini ikki nógv brúkt. Nú er hann farin upp á skúla, hann venur nógv, og í fleiri steypadystum hevur hann longu víst gott álopsspæl.

Jan Nónklett, sum í vetur flutti úr NSÍ og til Skála, er fluttur aftur í barndómsfelagið. Hann hevur ikki stundir at venja so nógv og fer at spæla við 2. deild. Rúni Rasmussen var í fjør í 1. deildarhópinum hjá NSÍ. Tað var hann eisini tíðliga í vár. Nú er hann fluttur til Skála, og hann er við í hópinum í morgin.

Hjá EB/Streymi eru allir spælararnir tøkir. Teir hava ikki spælt venjingardystir seinastu vikurnar, og teir síggja fram til dystin ímóti Skála. Einasti spælarin frá í fjør, sum ikki spældir við í ár, er Jón Sigurð Gleðisheygg. Nýggjur í EB/-Streymi er Jóhan Lützen, sum er ættaður úr Klaksvík og umframt í KÍ eisini hevur spælt í 2. deild hjá HB.



# Hann hugdi eftir skeivum liði



*Møguleikin fyri góðum úrsliti er til staðar, men vit vita allir, at vit skulu lyfta okkum til tað allar besta, um nakað skal fáast burturúr.*

**NSÍ venjarin var mikukvøldið í Gundadali og kannaði B36, tá hann kom til hús aftur, fekk hann at vita, at teir í staðin skuldu spæla ímóti HB!**

HB–NSÍ

*Jóannes Hansen*

Jógvan Martin Olsen fer í morgin fyri fyrstu ferð at hava ábyrgdina av NSÍ í landskappingini. Hann fyrireikar seg altíð væl til uppgávurnar, og soleiðis ætlaði hann eisini, at tað skuldi vera hesa ferð, men tað bleiv ikki heilt, sum hann hevði ætlað.

Mikukvøldið fór hann í Gundadal at kanna B36, sum NSÍ skuldi spæla ímóti á útivølli í fyrsta umfarinum.

– Í steðginum fekk eg at vita, at vit skuldu ikki spæla ímóti B36. Eg hoyrdi, at vit í staðin skuldu spæla sætta umfarið fyrst. Eg hevði ikki skipanina uppi á mær, so eg vitsti ikki fyrrenn eg kom til hús, at tað var HB, sum vit skuldu spæla ímóti sunnudagin, sigur Jógvan Martin Olsen.

NSÍ venjarin sigur, at HB vísti sera gott avrik mikukvøldið:

– Teir vóru góðir á øllum økjum. Tekniskt, kropsliga, taktiskst og sinniliga vóru teir so væl fyri, sum tað kann roknast við, at nakað lið er so tíðliga á árinum. Mínir spælarar hava ofta staðið seg væl í Gundadali. Møguleikin fyri góðum úrsliti er til staðar, men vit vita allir, at vit skulu lyfta okkum til tað allar besta, um nakað skal fáast burturúr.

Allir NSÍ spælararnir eru tøkir. Sunnudagin fingu teir ein orduligan kvøkk í steypakappingini, men tað eydnaðist akkurát at vinna plássið í hálvfinaluni í steypakappingini fyri nøsini á FS Vágum.

### HB væl fyri

Fótbóltur er eitt undarligt spæl. Í fjør var HB leingi í botninum. Eingin landskappingardystur er spældur enn, men avrikini hjá HB higartil boða frá, at teir vera betri við í ár – sjálvt um spælararnir so at siga eru teir somu, og venjarin er tann sami. Ein broyting er, at nú er Kári Nielsen hjálparvenjari. Hann var ein stórur stríðsmaður, tá hann spældi, og tað smittar ivaleyst av á spælararnar.

Ímóti NSÍ hevur HB somu manning, sum teir høvdu mikukvøldið ímóti B36. Annars siga teir í HB, at fyri fyrstu ferð í fleiri ár verður eingin leikskrá til dystin í morgin. Teir skuldu havt spælt á Toftum. Leikskránni ímóti KÍ á heimavølli komandi hósdag er komin undir land, men skotbráðið hevur verið ov stutt at gera skrá, síðani HB mikukvøldið frætti, at teir eiga heimadyst bæði í øðrum og í fyrsta umfarinum.

# VB venjarin roknar við nógvum

**TB er væl fyri undan fyrsta heimadystinum í bestu deildini, síðani teir fluttu niður fyri hálvum fjórða ári síðani**

TB-VB

*Jóannes Hansen*

3. oktober í 1998 hevði TB í síðsta leikumfarinum vitjan av GÍ. Gøtumenn vunnu 5–1, og harvið varð síðsti naglin negldur í hjá TB, sum síðani tá hevur verið í 2. deild. Í fjør sá tað leingi út til, at tað heldur fór at verða talan um stríð fyri at sleppa undan niðurflyting í 3. deild, heldur enn um uppflyting í 1. deild. Men so gekk undan, og TB flutti upp.

Í morgin fæst fyrsta ábendingin um, hvussu TB er fyri aftur at spæla í fremstu deildini. Teir skuldu fingið vitjan av EB/Streymi, men nú verður talan um heimadyst ímóti VB. Tað hevði kanska kenst eitt sindur lættari at spælt ímóti EB/Streymi heldur enn at skula spæla grannauppgerð beinanvegin, men soleiðis skuldi tað ikki vera.

– Allir spælararnir hjá okkum eru tøkir, og vit hava gott mót, sigur Zoran Mancic. Hann spældi við TB í fjør, og tá liðið fram ímóti summarsteðginum hevði mist venjaran, tók Zoran Mancic, sum nú hevur búð í Føroyum í fleiri ár, ábyrgdina á seg. Hann hevur áður verið í fleiri feløgum – eitt nú í VB, sum skal dystast á Sevmýri í morgin.

### Rokna við nógvum

VB hevur nýggjan venjara. Hann eitur Dragan Kovacevic, og hann er væl nøgdur við spælararnar og umstøðurnar:

– Føroyskur fótbóltur er betri fyri, enn eg frammanundan hevði roknað við. Spælararnir eru góðir at fáast við, og teir vísa professionellan hugburð undir venjing og í dystum. Nú hava vit ikki fingið dystarvenjing í tvær vikur, so vit gleða okkum at spæla. Eg rokni við, at okkara lið verður nóg gott at koma langt í steypakappingini, og vit rokna eisini við at gera okkum galdandi í landskappingini. Skulu vit tað, so skulu vit vinna á Tvøroyri, og tað fara vit at royna, sigur VB venjarin. Allir spælararnir hjá VB eru tøkir undan oyggjauppgerðini.

VB og TB hava spælt tveir venjingardystir. Á Sevmýri var úrslitið 2–2, eftir at VB hevði verið á odda 2–0. Á Vágs eiði vann VB 2–0.


# Talan kann gerast um lagnudyst

**Nýggju venjararnir á Eiði og á Skála eru greiðir yvir, at stigini frá innanhýsis uppgerðini á Mølini í morgin kunnu fara at vísa seg at hava avgerandi týdnging, tá tað verður gjørt upp í heyst**

EB/STREYMUR–SKÁLA

*Jóannes Hansen*

Skála stóð seg væl í bólkaumfarinum í steypakappingini. EB/Streymur er framvegis partur í steypakappingini. Teir eiga fjórðingsfinalu á ímóti VB.

– Vit vistu frammanundan, at vit skuldu spæla ímóti øðrum havnarliðnum í hálvfinaluni. Nú vita vit, at tað verður ímóti HB, skemtar EB/Streyma venjarin, Trygvi Mortensen.

Hann er sera spentur upp á fyrsta dystin, og eins og Skála venjarin, Mathias Davidsen, so er hann greiður yvir, at ein sigur í hesum dystinum kann vera sera týdningarmikil.

– EB/Streymur vísti í fjør, at teir kunnu fáa stig frá øllum, og vit hava í steypakappingini í ár víst, at vit kunnu fáa stig frá teimum, sum av góðum grundum verða roknað at teljast millum teir stóru. Men kortini eru vit vitandi um, hvar tað verður roknað við, at tað verður okkara lutur at stríðast. Tí kann úrslitið av dystinum í morgin hava sera stóran týdning, heldur Mathias Davidsen. Felags fyri hann og EB/Streyma venjaran, Trygva Mortensen, er, at teir tey seinnu árini hava havt sína dagligu gongd í NSÍ.

### Tvey reyð kort

Hjá Skála stendur tað ikki heilt so væl til við fólki, sum teir høvdu vónað. Í síðsta dystinum í bólkaspælinum í steypakappingini fingu tveir spælarar reytt kort. Tað var í Gundadali ímóti HB, at bæði Ronnie Hansen og Alexander Johansen vórðu riknir av vøllinum. Tí eru teir leikbannaðir í morgin.

Marius Joensen hevur verið plágaður av skaða í økslini síðani steypadystin ímóti KÍ, men hann er komin í fyri seg aftur. Og so verður tað spennandi at síggja, hvussu Jonhard Frederiksberg fer at roynast í landskappingini. Hann hevur siglt nógv, og tí eru góðu fótbóltsevnini ikki nógv brúkt. Nú er hann farin upp á skúla, hann venur nógv, og í fleiri steypadystum hevur hann longu víst gott álopsspæl.

Jan Nónklett, sum í vetur flutti úr NSÍ og til Skála, er fluttur aftur í barndómsfelagið. Hann hevur ikki stundir at venja so nógv og fer at spæla við 2. deild. Rúni Rasmussen var í fjør í 1. deildarhópinum hjá NSÍ. Tað var hann eisini tíðliga í vár. Nú er hann fluttur til Skála, og hann er við í hópinum í morgin.

Hjá EB/Streymi eru allir spælararnir tøkir. Teir hava ikki spælt venjingardystir seinastu vikurnar, og teir síggja fram til dystin ímóti Skála. Einasti spælarin frá í fjør, sum ikki spældir við í ár, er Jón Sigurð Gleðisheygg. Nýggjur í EB/-Streymi er Jóhan Lützen, sum er ættaður úr Klaksvík og umframt í KÍ eisini hevur spælt í 2. deild hjá HB.